## Heimsins størsta vindmyllulund

Danska orkufelagið Dong Energy, tað týska E.ON og Masdar boðaðu í gjár frá, at tey hava gjørt av at brúka 16,4 milliardir krónur til eina vindmyllupark á sjónum nærhendis ósanum á Themsen-ánni stutt frá London. Hendan ætlanin, sum er fyrsta byggistig, verður før fyri at framleiða 630 megawatt av streymi, og tá øll verkætlanin er fullførd, verður hon tann størsta av sínum slagi í heiminum og verður før fyri at framleiða meiri enn eitt gigawatt. Tað kann nøkta tørvin hjá 750.000 húsarhaldum ella einum fjórðingi av bústøðunum í London. Gongst sum ætlað, fáa tey fyrstu húsarhaldini streym frá vindmyllunum um trý ár.



## Kekkar stríðast um ES-sess

Í næsta mánað heldur ES toppfund í Bruxelles, og tað er greitt, at fundurin verður undir kekkiskari leiðslu, tí Kekka hevur formansskapin í samveldinum. Men nú eru teir báðir ovastu kekkisku leiðararnir farnir at stríðast um, hvør teirra skal sita í formansstólinum. Forsetin, Vaclav Klaus, hevur sagt, at hann ætlar sær at leiða toppfundin, men tað er forsætisráðharrin, Jan Fischer, ikki so fegin um. Í gjár hevði Fischer fund við formannin í ES-ænevndini, José Manuel Barroso, og aftan á fundin segði hann, at hann ætlar sær at sita í formansstólinum á toppfundinum í næsta mánað. Tað er tað útinnandi valdið, sum skal sita har, segði hann.

# Kvinnur eru politiskt



**Hóast kvinnur hava fullan rætt at taka lut í politikki, so hava tær eftir øllum at døma ikki skilt, at tað eisini er eina skylda at taka medborgaraskap og at luttaka í demokratinum. Hetta sigur danski høvundin Hanne Vibeke Holst, sum hevur verið á javnstøðurundferð í Føroyum**

JAVNSTØÐA
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

- Allur heimurin skríggjar eftir, at kvinnur eisini átaka sær leiðsluna. Støðan er alt ov álvarslig til bara at lata upp í hendurnar á monnum. Ella halda tit sjálvar, at tað gongur so gott? Hygg eftir Irak. Hygg eftir umhvørvinum. Hygg eftir búskaparkreppuni. Hava teir, við 8000 árum í forspringi, gjørt tað nóg gott? Kunnu vit ikki gera tað bara eitt lítið sindur betri? Systrar - tíðin er búgvin, til at taka medborgaraskylduna í álvara, at taka politiskt leiðaraskap og medábyrgd. Nú vit hava fingið rætt at taka lut, hava vit sanniliga eisini skyldu til tað!

Uppsangin eigur Hanna Vibeke Holst, høvundin handan bøkurnar um kongar, drotningar og prinsessur í donskum politikki. Seinastu dagarnar hevur hon verið gestur hjá Demokratia og Javnstøðunevndini, og í hesum sambandi hildið fyrilestrar um javnstøðu í Norðurlandahúsinum og í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

**!** **Feminisma**
*Tey, sum ynskja, at kvinnur skulu hava somu møguleikar sum menn, kunnu rópa seg feministar*

Og hon leggur ikki fingrarnar ímillum, tá hon leggur eftir nútímans kvinnum, sum, eftir hennara tykki, fullkomiliga tykjast at hava gloymt stríðið fyri javnstøðu, meðan tær hava lullað seg niður í eina hvíta sofu framman fyri Sex in the city.

Tí, hóast kvinnan bæði hevur útbúgving og útiarbeiði, vil hon ikki bjóða seg fram at leiðsluni. Tað eru framvegis mannfólkini, sum tjena 2/3 av inntøkunum í landinum. Og tað eru teir, sum skapa og stýra, meðan kvinnan røktar og umsitur, bæði úti og heima.

Hanne Vibeke Holst samanber nútímans kvinnur við húsmøður fyri 50 árum síðani. Meginparturin av orkuni verður brúkt til at pussa fasaduna, at síggja gott út, at gera góðan mat og at keypa teir røttu ljósastakarnar ella merkjaklæðir til børnini, sum eru smá lívsprojekt í kappingini um succes.

### Kellingaflís í eygað

50 ára gamla Hanne Vibeke Holst, journalistur og rithøvundur, vaks sjálv upp í einum smáborgarligum patriarkalskum umhvørvi í lítla býnum Løkken í Norðurjútlandi. Í einum heimi, har bæði foreldrini vóru rithøvundar. Men, meðan pápin tók sær pláss og tíð at sita og skriva inni á skrivstovuni í dagar og vikur, við sálarligum upp og –niðurtúrum, sat mamman úti við spísiborðið við skrivimaskinuni. So hvørja ferð familjan skuldi eta ella klæðir leggjast saman, mátti borðið, og hennara ritverk, ruddast av vegnum.

Sum so nógvar aðrar kvinnur fekk Hanne Vibeke Holst tað, sum hon rópar kellingaflísina í eygað í sjeytiárunum.

- Tá tú hevur fingið kellingaflísina í eygað, fer hon ongantíð úr aftur. Hon ger, at tú brádliga sært lívið, sum tað veruliga er, og ikki sum tú kundi ímynda tær tað, sigur Hanne Vibeke Holst.

Hetta, saman við íborna huginum at siga søgur, hevur havt við sær, at flestu bøkur hennara so ella so snúgva seg um kvinnur og vald, bæði í almenna rúminum og heima við hús.

Tað er ein reyðsokkatráður ígjøgnum allar bøkurnar, sum av litterera parnassinum hava verið skírdar feministiskur lættisoppalesnaður. Kortini eydnaðist tað henni at fáa tær størstu donsku bókmentavirðislønirnar í ár fyri nýggjasta bókaverkið um kvinnur í politikki.

### Feministiskt medvid

Skalt tú framat valdinum, og vilt tú varðveita tað, so noyðist tú at hugsa feministiskt. Hetta var ein av høvuðsboðskapunum hjá Honnu Vibeke Holst í Mentanarhúsinum í Fuglafirði í gjárkvøldið.

### Høvundurin og verk hennara

Hanne-Vibeke Holst er fødd í 1959. Hon er útbúgvin journalistur og hevur seinastu mongu árini virkað sum skribentur, kjakari og rithøvundi til bøkur, filmar og sjónvarp. Hon er nevndarlimur í fleiri nevndum og í donsku UNESCO-kommissiónini. Eisini er hon Goodwill Ambassador fyri ST-fólkatalsgrunnin UNFPA. Hon tekur javnan lut í almenna kjakinum í Danmark, og leiklutur hennara sum rithøvundi og kjakari hevur ført til eina langa røð av prísum.

Hon gav út fyrstu ungdómsbókina í 1980, og síðan komu fleiri. Mest kend er hon fyri verkið í trimum pørtum “Kronprinsessen” (2002), “Kongemordet” (2005) og “Dronningeofret” (2009).

**Virðislønir:**
De gyldne Laurbær 2008
Edvard Pedersens Biblioteksfonds Forfatterpris 2008
Hadsten Højskole-prísin 2007
Bog & Idé's lesaraprísin 2006
Dansk Kvindesamfunds Mathilde-prísin 2006
Årets Aktive Kvinde í 2004 av Lanndsforeningen Aktive Kvinder i Danmark
Søren Gyldendal Prísin 2003
Egholtprísin 1997
Kristian Dahls Minnisdelegat 1986
BMF barnabókaheiðursløn 1985